SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Myndirnar av flóttafólkunum eru so rørandi, at tær eiga at festa seg í sinnið á øllum, sum síggja tær*

*José Luis Zapatero*

# Tveittu síni deyðu børn fyri borð

**Fleiri túsund flóttafólk doyggja á veg úr Afrika til Evropa, og støðan hevur ongantíð verið so ring sum í ár**



*Hesin ársgamli drongurin var tað einasta barnið, sum var eftir á lívi í einum báti, sum kom til Spania fyri fjúrtan døgum síðani*

*Mynd: Polfoto*

Talið á teimum, sum royna at sleppa úr Afrika til Evropa at fáa sær eina betri tilveru, veksur í hvørjum og er vaksið serliga nógv í summar. Men tað merkir eisini, at talið á teimum, sum ongantíð koma vegin fram, men doyggja á leiðini, veksur og hevur ongantíð verið so stórt sum nú. Ein orsøk er, at tey suðurevropeisku londini hava hert eftirlitið við teimum ólógligu flóttafólkunum, og tað hevur fingið mannasmuglararnar at velja meiri vandafullar farleiðir.

Fyri fjúrtan døgum síðani kom spanska sjóverjan fram á ein bát, sum rak fyri vág og vind úti fyri Almeria á sponsku sólstrondini. Í bátinum vóru 33 útlúgvað fólk, sum vóru farin úr Marokko eina viku frammanundan. Men tey høvdu verið fleiri enn 33, tí tað vísti seg, at 15 fólk vóru deyð. Nígggju teirra vóru børn yngri enn fýra ár, og í teirri brennandi sólini vistu foreldrini sær eingi onnur ráð enn at tveita líkini fyri borð, skriva sponsk bløð. Av teimum, sum vóru á lívi, tá spanska sjóverjan kom fram á bátin, máttu fleiri flytast á sjúkrahús.

**Rørandi myndir**

- Hetta er tað ringasta, sum eg nakrantíð havi sæð, segði leiðarin hjá Reyða Krossi í Almeria, Francisco Vicente, við sponsku fjølmiðlarnar, og spanski forsætisráðharrin, José Luis Zapatero, segði, at myndirnar av flóttafólkunum áttu at fest seg í sinnið hjá øllum, sum síggja tær.

Sponsku bløðini skriva eisini um eina nigerianska kvinnu, sum hevði mist tvey børn á ferðini við báti til Evropa. Av teimum børnunum, sum vóru í bátinum, var bara eitt eftir á lívi. Tað var ein ársgamal drongur. Hann var illa á holdum komin eftir ta strævnu ferðina, men kom fyri seg eftir at hava fingið hjálp á sjúkrahúsinum.

Sponsku myndugleikarnir siga, at mannasmuglararnir leggja alt meiri fyri, nú londini í Suðurevropa hava hert eftirlitið við flóttafólkum. Myndugleikarnir siga, at í meðal rinda fólk einar 8.000 krónur fyri at sleppa við einum báti.

# Pávin bað um umbering fyri kynsliga ágangin

**Á vitjan síni í Avstralia bað Benadikt pávi fólk um umbering fyri tann kynsliga ágangin, sum katólska kirkjan hevur framt ímóti børnum har**



*Benadikt pávi heldur messu í Sidney*

*Mynd: Polfoto*

- Eg eri sera harmur um, at fólk hava liðið undir hesum ágangi, segði Benadikt pávi í einari prædiku, sum hann helt í Sidney í gjár. Hann segði, at kirkjan má greitt fordøma tær misgerðir, sum blivu framdar, og sum vóru eitt greitt álitisbrot, og hann lovaði, at tey seku skulu standa til svars fyri tað, sum tey hava gjørt.

Í einari messu, sum pávin helt fyri katólskum prestum og biskuppum í Sidney, kom hann við einari treytaleysari umbering.

- Kynsligi ágangurin hevur verið oyðileggjandi fyri katólsku kirkjuna, og vit skammast av tí ágangi, sum børn og ung her í landinum hava verið fyri, segði pávin.

Felagsskapurin hjá teimum, sum hava verið fyri kynsligum ágangi innan ta katólsku kirkjuna í Avstralia, Broken Rites, sigur, at tað finnast umleið 100 greið dømi um offur fyri ágangi innan kirkjugátt ella frá kirkjunnar tænarum. Tað eru tó tey, sum halda, at tað veruliga talið er mundi størri og helst fleiri túsund, skrivar Reuters.

Broken Rites hevði kravt, at Benadikt pávi skuldi koma við einari almennari umbering, nú hann hevur virjað í Avstralia. Tað gjørdi pávin so í gjár, men fleiri halda, at kirkjan eigur ikki at sleppa so lætt. Sama kravið kom undir einari pávavitjan í USA í 2002, og eisini ta ferðina bað pávin um umbering kirkjunnar vegna.

## STUTT SAGT

### Moon neyðlendi

Sun Myung Moon, sum stovnaði Sameiningarkirkjuna, fekk skaða, tá ein tyrla, sum hann var í, neyðlendi á einum fjalli í Suðurkorea í gjár. Sambært myndugleikunum, vóru 16 fólk í tyrluni, og 14 teirra fingu skaða. Millum teirra, sum vóru í tyrluni, var kona Moon og fleiri skyldfólk teirra.

Tíðindastovan AP skrivar, at eldur kom í tyrluna, tá hon neyðlendi á Gapyeonfjallinum, sum er einar 60 kilometrar í landssynning úr høvuðsstaðnum Seoul. Sagt verður, at Sun Myung Moon var á veg at vitja eitt sjúkrahús, tá tyrlan noyddist at neyðlenda.



*Myung Moon*

*Mynd: AP*

### Hittast aftur

Samráðingarmenn hjá ES og Iran samdust á fundi í Genéve í gjár um at halda fram við samráðingunum um iranskukjarnorkuverkætlanina. Seks stórveldi høvdu umboð á fundinum, og teirra millum var amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice.

Altjóða samfelagið hevur kravt, at Iran skal gevast við at ríka uran, sum kann brúkast til at gera kjarnorkubumbur við, men Mahmoud Ahmadinejad, forseti, hevur sagt, at tað kemur ikki upp á tal. Uttanríkispolitiski samskiparin hjá ES, Javier Solana, segði aftan á ein fund við iranska samráðingarleiðaran Saeed Jalili í Genéve, at teir báðir eru samdir um at tosa saman um einar fjúrtan dagar.



*Iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad*

*Mynd: Polfoto*